Álit

í

løgtingsmáli nr. 35/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) (Leinging av rættinum til barsilspening, hækking av barsilsgjaldinum og broyting viðvíkjandi kærunevndini)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 30. september 2020 og eftir 1. viðgerð tann 9. oktober 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 12., 17. og 24. november og 1. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Fakfelagssamstarvið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Barsilsskipanina og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Skotið verður upp at leingja løntu barsilstíðina við 4 vikum, so hon kemur upp í 52 vikur. Samstundis verður skotið upp at hækka barsilsgjaldið úr 0,71% uppí 0,86%.

Nú Barsilgrunnurin hevur undirskot stendur greitt, at útrokingarnar, sum hava ligið sum grund undir víðkanini av løntа barsilsfarloyvinum seinastu árini, ikki hava hildið, og hækkaðu inntøkurnar tí ikki verið nóg mikið til at dekka øktu útreiðslurnar.

Harumframt kunnaði landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum nevndina undir viðgerðini um, at ein álvarsamur feilur varð gjørdur í skipanini, í sambandi við at eftirløn við lóg varð løgd afturat barsilsútgjaldinum.

Í skrivinum, ið er latið Vinnunevndini stendur, at "Í stuttum hevur feilurin við sær, at útgjøld til eftirløn ikki eru útreiðsluførd í rakstrinum, og tí er Barsilsgrunnurin ikki kravdur eftir fullari upphædd, sum Barsilsskipanin hevur goldið út.
TAKS hevur staðfest, at øll útgjøld frá Barsilsskipanini til persónar og arbeiðsgevarar eru rætt. Sostatt hevur feilurin ikki havt ávirkan á borgarar og vinnu, men hevur heldur havt við sær eina skeiva mynd av, hvørjar rakstrarútreiðslur skipanin hevur havt, og hvussu stór samansparingin hevur verið í Barsilsgrunninum".

TAKS hevur í sambandi við hetta mistak eisini kunnað landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum um, at gamla BAMN-skipanin, sum barsilsgjøldini fara um, og sum er frá 2001, er ósmidlig og hevur tørv á dagføring. Avmarkaðir møguleikar eru fyri at trekkja dátur úr skipanini og at gera dynamiskar framskrivingar.

Vinnunevndin heldur tað hava stóran týdning at fáa samansett og eftirfarandi hagtøl úr skipanini, og mælir staðiliga til, at hon verður dagførd.

Saman við skrivinum fylgja dagførdar útrokningar av haldførinum hjá grunninum við hækkaða inngjaldinum. Hetta kann lesast í skjali frá TAKS og skrivinum frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, latið Vinnunevndini.

Umboð fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum hava víst á, at sera nógvar broytingar eru gjørdar í skipanini, síðan hendan varð sett á stovn, og at tørvur er á at gera eina heildarmeting av skipanini, og gera hana smidligari og meira tíðarhóskandi fyri lønmóttakarar og arbeiðsgevarar.
Hesum er nevndin samd í, og vísir á uppskot, sum verið hava um at gera skipanina meira smidliga, og sum eisini er nevnt í samgonguskjalinum.
Nevndin mælir tí til, at eitt arbeiði verður sett í gongd saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum við tí endamáli at gera skipanina enn betri og meira tíðarhóskandi.

Nú gjaldið enn einaferð verður hækkað er vert at vísa á, at metingarnar fyri fíggjarstøðuna hjá skipanini ofta ikki hava verið serliga eftirfarandi. Tí eigur landsstýrismaðurin at halda eitt vakið eyga við, hvørt inngjaldið er á hóskandi støði, ella um tað kanska kann lækka aftur, um tað vísir seg skjótt at vera fíggjarliga ráðiligt. Skipanin verður borin uppi av A-løntarinntøkum, har arbeiðstakari og arbeiðsgevarar gjalda inn. Samstundis kunnu B-inntøkur tekna sera bíliga trygging fyri at verða fevnd av skipanini. Hesi viðurskifti eiga eisini at verða eftirmett, so skipanin er so rættvís, sum til ber.

Uppskotið varð ikki sent til hoyringar, áðrenn tað kom í Løgtingið. Hetta kann undra, havandi í huga, at tað at broyta barsilslógina stóð á løglistandum í ólavsøkurfrágreiðing løgmans á ólavsøku.

Nevndin minnir á, at tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum burturav fíggja Barsilsskipanina, og tí eiga broytingar í hesum uppskoti at verða send teimum til hoyringar.

Samanumtikið fegnast nevndin um, at málið um lønta barsilsfarloyvistíð nú samsvarar við tær 52 vikurnar, foreldrini samanlagt hava rætt til barsilsfarloyvi.

<u>Harumframt hava Bjørt Samuelsen og Bjarni Hammer hesar viðmerkingar:</u>

Undirritaðu vísa harumframt á, at av barsilsfarloyvinum eru 14 vikur markaðar mammuni, ímeðan einans 4 vikur eru markaðar pápanum. Foreldrini eiga at verða meira javnsett í rættinum til barsil.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at ”Hagtøl úr Føroyum og hinum Norðurlondunum vísa, at pápar fara í barsilsfarloyvi so leingi, sum barsilsfarloyvið
við lóg er markað til teir. Avleiðingin av lógaruppskotinum kann tí væntast at verða, at mammur fara at vera í barsilsfarloyvi í 48 vikur í mun til 44 vikur, sum nú.”

Sammett við onnur Norðurlond taka føroyskir pápar lutfalsliga minsta partin av barnburðarfarloyvinum. Til sammetingar taka pápar í Íslandi 30% og í Svøríki 27%, tí rættindini til barsil eru meira javnsett har. Undirritaðu meta, at tað, at pápin tekur longri barsilsfarloyvi við pinkubarninum, kann vera ein lutur, ið styrkir bæði sambandið og rættindini hjá pápanum, so mamma og pápi gerast meira javnsett í mun til barnið. Eins og tað eisini styrkir støðuna hjá mammuni á arbeiðsmarknaðinum, við tað, at arbeiðsgevarar vita, at pápar eins væl og mammur fara í barnsburðarfarloyvi, tá tey fáa børn.

Undirritaðu halda tí, at av longda farloyvinum upp á 4 vikur, áttu minst 2 vikur at verið markaðar pápanum, so pápin í minsta lagi hevði 6 vikur markaðar honum. Undirritaðu hava fingið at vita, at tað av lógartekniskum áum – vantandi identiteti – ikki ber til at gera broytingaruppskot um hetta.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 1. desember 2020

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	